

## Barbara í Gongini í Múllers Pakkhúsi

Í dag og í morgin ber til at síggja nýggjastu klæðini hjá Barbaru í Gongini í Müllers Pakkhúsi. Føroyski sniðgevin er heima fyri at kunna um sítt merki, og verður eisini høvi at síggja upptøku av mótaframsýningina, ið varð sýnd á mótavikuni í París í august 08. Eisini verður høvi at ogna sær pløgg frá summarkollektiónin 09. Barbara verður at hitta í Múllers Pakkhúsi 15. og 16. Mai. Tiltakið í fríggjadagin byrjar klokkan 14.

# Tosið ikki ov hart um grindadráp



**Á almennum fyrilestri, sum heimsins leiðandi serfrøðingur í kappingarsamleika, Simon Anholt, helt, vísti hann á, at grindadráp avgjørt ikki gagnar føroyska umdøminum úti í heimi**

BRANDING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sannleikin er ofta illa lýddur.

Eftir fyrilesturin, sum kendi enski serfrøðingurin í branding, Simon Anholt, helt, var høvi hjá teimum um 70 áhoyrarunum at seta fram spurningar. Og sjálvandi snúði ein spurningur seg um grindadráp.

Svarið var neyvat tað, ið føroyingar yvirhøvur mundu vænta og vóna, tí uttan at siga tað bart út mælti hann føroyingum til at gevast við at drepa grind.

- Tá heimsopiniónin er ímóti grindadrápi, so mugu tit bara góðtaka tað. Tað hjálpir ikki at siga, at tit altíð hava dripið grind, segði Simon Anholt.

Hann líknaði tað saman við fólki, ið búðu nærhendis einum gosfjalli. Tá gosfjallið knappliga fer at goysa, og fólk síggja lavaina koma floymandi oman móti húsunum, so verða tey noydd at taka til rímingar.

- Tá hjálpir ikki hjá húsfólkinum at siga, at tey altíð hava búð har, tey mugu boyggja seg fyri beiska veruleikanum, segði Simon Anholt.

Hann vísti annars á, at tvøst og spik er ósunnur matur, fyltur við kyksilvuri, og at føroyingar tí allarhelst av sær sjálvum fara at gevast við at eta grind.

- Latið vera við at tosa ov hart um grindadráp, so kanska tað hvørvur av sær sjálvum, segði Simon Anholt.

Hann legði dent á, at skulu Føroyar gera sær vónir um at tekkjast útheiminum, so er alneyðugt, at fylgja heimsopiniónini. Tað hjálpir ikki at halda fast um eitt nú grindadráp, tí fólk yvirhøvur eru ímóti hesum.

*Uttan at siga tað beinleiðis mælti Simon Anholt til, at føroyingar gevast við at drepa grind*

# Ikki broyta men branda



*Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri, er samdur við Smon Anholt í tí mesta, sum enski serfrøðingurin førir fram, men ikki, tá tað kemur til grindadráp*

**Endamálið við at fáa Simon Anholt at ráðgeva okkum er ikki at broyta tað, vit eru, men at finna tað og branda tað**

BRANDING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Uttanríkismálaráðharrin, sum hevur sett Simon Anholt at ráðgeva ráðnum, er ikki samdur við serfrøðinginum í, at grindadráp er avgerandi fyri, um Føroyar gerast eitt gott brand ella ikki.

Eitt hitt størsta ferðamannalandið í heiminum er Spania, sum millum annað er kent fyri tarvafekting. Men tað heldur ongum frá at vitja landið, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at Ísland, Noregi og Japan eisini eru vælumtókt ferðamannalond, og øll trý eru hvalaveiðitjóðir.

Uppgávan hjá Simon Anholt var ikki at broyta okkum, men at finna samleikan og promovera hann. Og grindadráp hevur ikki volt okkum teir stóru trupulleikarnar, burtursæð frá onkrum stuttum tíðarskeiði. Hinvegin eru fleiri dokumentarfilmar gjørdir, sum vísa grindadráp á ein positivan hátt, og hesir eru vístir í stórum londum sum USA og Australia, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at endamálið við at branda Føroyar ikki er, at gera Føroyar kendar um allan heimin, men at hjá teimum, sum koma at kenna Føroyar, verða vit allur heimurin fyri teimum.

Grindadráp skal ikki verða okkara brand kortini. Vit hava dripið grind í øldir, og tá tú samanber fyrimunir og vansar við grindadrápi dugi eg ikki at síggja nakra slagsíðu, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur ikki, at dømi við gosfjallinum er serliga rámandi, tí tað er altíð ein potentiellur vandi við at búgva við eitt gosfjall, og skuldi verið byrgt upp fyri tí, skuldi til dømis eingin fest búgv í Íslandi.

Tað var ongantíð ætlanin, at Simon Anholt suldi broyta Føroyar, men vinna samleikan og branda hann, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri.